FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# PhD-skeið

Náttúruvísindadeildin bjóðar PhD skeið við heitinum "Ávirkan av havi og veðurlagi á havvistskipanir".

Skeiðið gevur eina breiða lýsing av, hvussu livandi verur og vistskipanir eru bundnar av fysiskum eginleikum og tilgongdum í havinum og av veðurlagnum.

Fortreyt fyri at kunna taka skeiðið er lokin bachelorútbúgving í náttúruvísindum (ella tilsvarandi).

**Ábyrgd av skeiðnum**
Bogi Hansen, professari við Fróðskaparsetur Føroya

**Skeiðsstað**
Havstovan, Nóatún 1, 100 Tórshavn

**Skeiðsbyrjan**
Februar 2010

**Evni**
Skeiðið verður skipað eftir bókini "Dynamics of Marine Ecosystems" hjá K.H. Mann og J.R.N. Lazier (3. útg., ISBN: 978-1-4051-1118-8), men verður útbygt við ymsum vísindaligum ritgerðum. Viðgerðin er heimsumfatandi, men við serligum denti á havleiðirnar kring Føroyar.

**Undirvísing**
Fyrilestrar og umrøða av frágreiðingum og framløgum.

**Døming**
Skeiðið verður mett sum staðið ella ikki staðið. Tvær ferðir undir skeiðnum og eina ferð aftaná lata tey lesandi inn frágreiðingar og hava eina framløgu um uppgivin evni. Verða hesi øll góðkend, er skeiðið staðið.

**Arbeiði**
Tey lesandi mugu rokna við at brúka 200 tímar (íroknað fyrilestrar, frágreiðingar, framløgur og fyrireiking).

**Tilmelding**
Tilmelding á setur@setur.fo áðrenn 29. januar 2010 (Legg við váttað avrit av prógvum). Nágreiniligari upplýsingar um skeiðið eru at fáa frá Boga Hansen, bogihan@hav.fo. Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum.

**FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA**
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Avloysarastarv í etnologi ella líknandi frøðigrein á Fróðskaparsetri Føroya

Á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya er eitt granskingar- og undirvísingarstarv í etnologi leyst at søkja. Starvið verður sett sum eitt fyribils avloysararstarv fram til 1. januar 2011. Tann, ið settur verður, skal virka fyri at menna gransking og útbúgving á deildini.

**Starvsøki**
Granskingarparturin verður tengdur at serøki umsøkjarans. Starvið ber í sær gransking, undirvísing, fyrisiting og samskifti við onnur granskingarumhvørvi.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu minst hava kandidat- ella masterútbúgving í etnologi, mannfrøði ella mentanarfrøði ella eina útbúgving, sum kann javnsetast við hetta. Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava granskað í føroyskum viðurskiftum.

Ein innanhýsis metingarnevnd verður sett at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsóknarfreistin er 1. februar 2010.

Starvið verður sett 1. mars 2010 ella skjótast til ber.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til fyrisitingarstjóran, Rúnu Hjelm runah@setur.fo ella til rektaran, Jóan Paula Joensen jopajo@setur.fo.

Upplýsingar um virksemið á Fróðskaparsetrinum eru at finna á heimasíðuni: www.setur.fo.

Umsóknir saman við avrit av prógvskjølum, CV, skrá yvir granskingarvirksemi, skrivligum og prentaðum vísindaritum skal sendast til:

**FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA**
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# LEKTARI

## í samfelagsvísindi

### Starv á Fróðskaparsetri Føroya

Á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum er eitt granskingar- og undirvísingarstarv í samfelagsvísindi leyst at søkja. Starvið verður sett sum lektarastarv, og tann, ið settur verður, skal virka fyri at menna gransking, útbúgving og undirvísing í samfelagsvísindi á deildini.

**Starvsøki:**
Granskingarparturin verður tengdur at serøki umsøkjarans. Samstarv innan- og uttanseturs er týdningarmikið í starvinum.

Undirvísingarparturin fevnir um undirvísing og fakliga ábyrgd av bachelorútbúgving í samfelagsvísindi/stjórnmálafrøði og at fyrireika masterútbúgving .

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar skulu umframt samfelagsvísindaliga kandidatútbúgving sum sosiologur, stjórnmálafrøðingur ella líknandi hava granskaraútbúgving á PhD umframt undirvísingar- og fyrisitingarroyndir.

Við umsóknum skulu umframt CV og yvirlit yvir egna gransking eisini fylgja avrit av vísindaligum avrikum í trimum eintøkum.

Sett verður serkøn metingarnevnd at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum. Gjørt verður vart við, at hvør umsøkjari fær sendandi metingina um sínar førleikar.

Starvið verður at seta 1. mai 2010. Umsóknarfreistin er 16. februar 2010.

Løn og starvstreytir eru sambært sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda tær til rektaran, Jóan Paula Joensen jopajo@setur.fo ella fyrisitingarstjóran, Rúnu Hjelm runah@setur.fo.

Upplýsingar um virksemið á Fróðskaparsetrinum eru at finna á heimasíðuni: www.setur.fo.

**Umsóknir skulu sendast til:**
*Fróðskaparsetur Føroya*
*J.C. Svabos gøtu 14 · Postrúm 272*
*FO-110 Tórshavn*

**FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA**
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo




Hevur tú hund?
So burdi tú eisini havt SKYTTENs SPECIAL
**SPECIAL – 20 kg kr. 450,-**
Turrfóður til vaksnar hundar. Við omega-3 og omega-6 feittsýrum, ið geva blankan og skínandi pels. Sera gott til hundar við húð- og pelstrupulleikum og til eldri hundar.
**Bílegging á kho@olivant.fo ella tel. 22 12 40**




Joensen Auto El-verkstað
Vit umvæla og selja startarar og dynamo'ir til øll bilmerkir.
Vit testa eisini tín bil við landsins besta testara.
Joensen Auto El-verkstað
FO-370 Miðvágur · Tel. 211669


## Frá Felagsnevndini fyri Føroysku fráhaldsfeløgini

**Aðalfundur verður í Losjuni í Havn tann 13. febuar 2010 kl. 16.00.**

Skrá: sambart lógum felagsins.

Uppskot til aðalfundin skulu verða nevndini í hendi í seinasta lagi 14 dagar áðrenn aðalfundin.

**Nevndin**